# Toppskjúttin gullbrúdleyp

**Tað eydnaðist ikki toppskjúttanum at skjóta mál, tá ið Rógvi Jacobsen var fyri 50. ferð á landsliðnum**

50. FERÐIN
*Jákup Mørk*

Tað er ikki á hvørjum degi, at føroyska landsliðið skorar trý mál. Soleiðis var tað hesa ferð. Merkisvert var tað, at toppskjúttin, Rógvi Jacobsen, sum hevur skorað mest sum øll málini nøgvu tær seinastu ferðirnar, hesa ferð ikki taldist millum málskjúttarnar.

Tað var eisini merkisvert, at Rógvi Jacobsen í Estlandi mikukvøldið fyri 50. ferð umboðaði føðilandið. Rógvi royndi seg fyri fyrstu ferð á landsliðnum mikudagin 18. august 1999, tá ið Føroyar á heimavølli taptu vinardyst ímóti Íslandi 1-0. Ta ferðina varð Rógvi Jacobsen fimm minuttir fyri leiklok skiftur inn fyri Julian S. Johnsson.

Rógvi Jacobsen, sum er føddur 5. mars í 1979 og harvið er 29 ára gamal, er níggjundi føroyski landsliðsspælarin, sum røkkur hálvt hundrað landsdystum. Hinir eru Óli Johannesen (83), Jens Martin Knudsen (65), Julian S. Johnsson (62), John Petersen (57), Jákup Mikkelsen (56), Allan Mørkøre (54), Jákup á Borg (53) og Øssur Hansen (51).

Tveir teir næstu í røðini, sum tað er sannlíkt skulu røkka hálvt hundrað landsdystum, eru Fróði Benjaminsen (48) og Christian Høgni Jacobsen (41). Frá teimum báðum er langt lop niður til næsta mann, sum er Súni Olsen, ið mikukvøldið umboðaði Føroyar fyri 32. ferð.



*Rógvi Jacobsen er millum teir, ið hava rundað 50 landsdytir*

# Langt millum stóru tølini

**Tað eru næstan fýra ár síðani, at Føroyar hava skorað fleiri enn eitt mál í landsdysti, og hetta var fyrsta ferðin, at Føroyar hava skorað trý mál og ikki vunnið**

MÁLINI
*Jákup Mørk*

Føroyar hava ikki skorað meiri enn eitt mál í sama dysti síðani 9. oktober í 2004. Tann dagin var úrslitið í HM undankappingar dystinum á útivølli ímóti Kypros 2-2. Ta ferðina vóru Claus Bech Jørgensen og Rógvi Jacobsen málskjúttar.

Føroyar hava ikki skorað trý mál í einum og sama landsdysti síðani 18. august í 2004, tá ið vinardystur á heimavølli ímóti Malta endaði 3-2.

Dysturin í Tallinn mikukvøldið var tann 119. altjóða skrásetti fótbóltslandsdysturin hjá Føroyum. Føroyar hava ongantíð skorað fleiri enn trý mál í einum dysti. Mikukvøldið var sætta ferðin, at Føroyar hava skorað trý mál í einum dysti, og hetta var fyrsta ferðin, at Føroyar ikki hava vunnið, tá ið tað hevur eydnast at skjóta trý mál.

**Hinar ferðirnar, tá ið Føroyar hava skorað tríggjar ferðir:**
Føroyar-San Marino 3-0
*25. mai 1995,*
San Marino-Føroyar 0-3
*11. oktober 1995,*
Føroyar-Liktinstein 3-1
*19. august 2002,*
Føroyar-Kasakstan 3-2
*27. apríl 2003*
Føroyar-Malta 3-2
*18. august 2004.*



*Suni Olsen skoraði uppá brotsspark*

# Endiliga var eydnan við Lamhauge

**Hóast hann fleiri ferðir hevur verið tætt við, so var tað ikki fyrrenn í 11. landsdystinum, at tað eydnaðist Christian Lamhauge Holst at skjóta mál á landsliðnum**

TVÍFALDUR MÁLSKJÚTTI
*Jákup Mørk*

Eingin ivi er um, at hann hevur nøs fyri málmøguleikum og málum. Aftur og aftur hevur Christian Lamhauge Holst verið málskjútti á superligu liðnum hjá Lyngby.

Í farna kappingarári skoraði Lyngby 33 mál og flutti niður. Christian Lamhauge Holst skoraði níggju av málunum, og tað rakk til sætta plássið á máltindinum.

Á landsliðnum hevur Christian Lamhauge Holst ofta víst, at hann hevur nøs fyri málmøguleikum. Men í tíggju teimum fyrstu landsdystunum eydnaðist tað honum ikki at skjóta mál, og tað var einki at siga til, at hann og hinir á og kring landsliðið vóru farnir at ivast í, um tað yvirhøvur fór at eydnast hjá honum at skjóta mál fyri Føroyar.

Mikukvøldið eydnaðist tað so rudduliga. Í 63. minutti varð hann spældur leysur mitt fram eftir vøllinum av Súna Olsen. Lamhauge maðurin skundaði sær frammanfyri verjuna og fram ímóti málinum, har innskifti málverjin Artur Kotenko hevði hug at tveita seg niður í bóltin, sum. Christian kalt og sannførandi lyfti upp um málverjan og mitt í málið.

Tríggjar minuttir seinni var Christian Lamhauge Holst aftur á rætta staðnum í røttu løtuni, og aftur eydnaðist honum at skjóta mál. Hesa ferð var tað eftir hornaspark og eitt sindur av aftur og fram dygst undir málinum. Tá ið tað sjey minuttir eftir fyrsta málið varð bríkslað fyri brotssparki, sum Súni Olsen sendi upp í hornið til høgru fyri seg sjálvan, varð dømt, tí verjuspælari hevði havt hond á bóltinum.

Christian Lamhauge Holst er 26. spælarin, sum hevur skorað mál fyri Føroyar í altjóða skrásettum landsdystum, síðani Føroyar gjørdust limir í altjóða fótbóltsfamiljuni fyri knappliga tjúgu árum síðani.

# Jónas og Høgni fyri fyrstu ferð

**Nú hava 109 spælarar umboðað Føroyar í 119 altjóða skrásettum fótbóltslandsdystum**

NÝGGIR SPÆLARAR
*Jákup Mørk*

Tveir spælarar royndu seg fyri fyrstu ferð á landsliðnum í Tallinn í gjárkvøldið. Jónas Þór Næs var á høgra vongverja frá fyrsta bríksli. Hann var á vøllinum alla tíðina, og tað er ikki óhugsandi, at ágrýtni og skilagóði Køge vongverjin fer at fáa boð aftur, tá ið næsta roynd-in fer at verða á skránni.

2. hálvleikur var tólv minuttir gamalur, tá ið Høgni Madsen fyri fyrstu ferð steig á vøllin sum landsliðsspælari. Hann loysti Tem Hansen av. At Høgni fekk landsliðsboð segði venjarin í sambandi við úttøkuna komst av, at hann hevur staðið seg so væl í heimligu kappingini. Høgni var sentralur miðvallari ta løtuna, tá ið Føroyar skoraðu trý mál, og tað var um reppið, at Súni Olsen eftir upplegg frá Høgna Madsen legði Føroyar á odda.

Jónas Þór Næs var 108. og Høgni Madsen 109. landsliðsspælarin, sum hava umboðað Føroyar í altjóða skrásettum landsdystum. Dysturin í Estlandi var nummar 119 í røðini, síðani tann fyrsti var á skránni í Íslandi 24. august í 1988.

Tríggir føroyskir spælarar sótu á beinkin um allar 90 minuttirnar. Felags fyri teir allar tríggjar er, at teir framvegis bíða eftir at sleppa framat fyri fyrstu ferð. Teir tríggir eru eykamálverjin RenéTórgarð, verjuspælarin Herbert í Lon Jacobsen og Áki Petersen. Hesin síðsti var fyri fyrstu ferð í landsliðsferðalagnum, meðan hinir báðir longu hava bíðað á beinkinum fleiri ferðir.

Tað eru fleiri dømi um, at spælarar ongantíð koma landsliðnum nærri enn at sita á beinkinum. Tað eru eisini dømi um spælarar, sum hava sitið leingi á beinkinum, áðrenn teir hava fingið møguleikan. Besta dømið á liðnum, sum spældi í Tallinn í gjárkvøldið, er málverjin og liðformaðurin Jákup Mikkelsen.

Jákup sat á beinkinum í fyrsta landsdystinum í Íslandi 24. august 1988. Fyrsta ferðin Jákup fekk høvi at verja málið var í vinardystinum í Neskaupstaði 2. juli í 1995 ella knappliga sjey ár eftir, at hann fyrstu ferð hevði sitið á beinkinum. Nú hevur Jákup vart málið 56 ferðir!